www.oljan.fo

Jan Müller 24 - 10 - 2012

Taka oljupallar sundur á Skálafjørðinum

Vit fylgja sjálvandi við, hvat hendir í oljuvinnuni rundan um okkum, og her er sundurtøka av gomlum oljupallum avgjørt eitt møguligt komandi virkisøki hjá MEST, sigur stjórin Mouritz Mohr við oljan.fo. Í dag er oljuráðstevna á Faroexpo í Runavík og er sundurtøka av gomlum oljupallum partur av skránni. Ein av útlendsku fyrilestrarhaldarunum fer at umrøða hetta fyri okkum føroyingar enn fremmanda evnið. Eg eri fegin um, at Faroexpo tekur upp eitt slíkt evni, tí hóast tað ikki er aktuelt hjá okkum her og nú, so er greitt, at hesin parturin av risastóru altjóða oljuvinnuni, nevndur Decommissioning, avgjørt fer at hava okkara áhuga í framtíðini, sigur Mourtiz Mohr. Hann sigur, at MEST fylgir væl við, hvar hendir rundan um okkum, bæði hvat umvæling av oljupallum og sundurtøka av gomlum pallum viðvíkur. Vit eru í teirri hepni støðu í Føroyum, at vit liggja rímuliga tætt við nógvar gamlar oljuleiðir. Vit hava virkisumstøður og uppland á eitt nú Skálafjørðinum, og vit hava fleiri fyritøkur í Føroyum, sum saman kunnu gera tað aktuelt í framtíðini at taka gamlar pallar henda vegin og taka teir sundur. Væl fyrireikað Mouritz Mohr vísir tó á, at vit í slíkum høpi eiga at vera sera væl fyrireikað, ikki minst hvat umhvørvisavbjóðingum viðvíkur. Her má einki skundast ígjøgnum. Tvørturímóti mugu tað almenna og privata vinnan tosa saman, soleiðis at hædd verður tikin fyri m.a trygdar- og umhvørvisreglum. Tá tað er komið uppá pláss skuldi einki verið í vegin fyri at tikið upp samráðingar við eigararnar av gomlu pallunum sigur hann. Hann heldur fyri, at hóast her er talan um stórar avbjóðingar, so eiga vit at síggja hetta sum ein framtíðar møguleika fyri føroyska vinnu. At kunna taka sundur gamlar oljupallar og skilja teir í bingjur er nakað, sum vit føroyingar megna eins væl og okkara grannar. Umvælingar ein møguleiki eisini Hann leggur aftrat, at MEST fylgir eisini væl við á øðrum økjum innan oljuvinnuna. Sjálvandi eru vit fegnir um at

fáa umvælingar av bæði føroyskum frálandaskipum og útlendskum oljuskipum, sum koma henda vegin, men vit eiga eisini at royna at sannføra útlendsku oljufeløgini um, at hóast tað kann vera ein løta at sigla oljupallar henda vegin, so kunnu vit átaka okkum umvælingararbeiði av ymsum slag. Oljan.fo skilur, at higartil hevur tað m.a verið ein forðing fyri at umvæla oljupallar í Føroyum, at teinurin av oljuleiðunum í eitt nú Norðsjónum er langur. Men tað roynir MEST so at vísa aftur við at vísa til teir fyrimunir, sum oljufeløgini kunnu fáa við at brúka føroyska vørur og tænastur. Myndir Mouritz Mohr, stjóri á Mest Alex West, sum fer at halda fyrilestur um sundurtøku av oljupallum